# Sjómenn fáa sín dag í Klaksvík

**Føroyameistarar og heimsmeistarar í egning, sjómanstaki og øðrum øðrvísi kappingargreinum skulu finnast í Klaksvík, tá ið fyrsti Sjómannadagurin verður hildin har leygadagin. Eisini verða framsýningar, undirhald, morgunmatarborð og annað á skránni**

SJÓMANNADAGUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Sjógvurin og sjómenn verða í miðdeplinum, tá ið Føroya Sjómannadagur verður hildin á Stongunum í Klaksvík leygardagin.

Hetta er fyrstu ferð, at tiltakið verður hildið, men tað verður gjørt sera nógv burtur úr, og allan dagin eru áhugaverd og øðrvísi tiltøk á skránni.

Lagt verður fyri leygarmorgunin klokkan 9, tá ið boðið verður vælkomin, og landsstýrismaðurin við fiskvinnumálum, Bjørn Kalsø, fer at seta dagin. Síðani verður stórt morgunmatarborð.

Allan dagin hava sølubúðir og framsýningar opið, og klokkan 9.45 byrjar ein almennur partur við røðum og avdúkingum. Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, fer at avdúka standmynd, sum Archibald Black og Ólavur Samson hava gjørt.

Klokkan 10.00 kemur nýggi bjargingarbáturin Ziska til Klaksvíkar. Hendan bátin hevur Norðoya Bjargingarfelag keypt úr Bretlandi, og hann fer at leggja at á Stongunum. Tá ið Ziska kemur til Klaksvíkar verður hann í fylgi við bæði Tjaldri og Triton, og tá fer umboð fyri Klaksvíkar kommunu at halda røðu.



*Sjómenn fáa nú sín heilt serliga dag í Klaksvík leygardagin. Kappingar, avdúkingar, framsýningar og mangt annað verður á skránni*

*Mynd: Dávur Winther*

## Nógvar kappingar

Eftir tann almenna partin byrja tær mongu kappingarnar, sum ivaleyst verða bæði stuttligar og øðrvísi.

Kappast verður í at hoppa á boyum, togtogan millum skipsmanningar, kapprógving, trolbøting, at skera agn, stafettrenning við stampum, sjómanstaki, halda dregg, kasta lodd, kevling og so ikki minst í egning.

Egnikappingin hevur ein altjóða dám, tí eftir at føroyameistarin er funnin, skal hann kappast við íslendska og norska meistaran um heimsmeistaraheitið.

Umframt kappingar verða eisini bjargingarroynd, fólkalívsmyndir og enda verður við bryggjudansi frá klokkan 22.00.

Klokkan 20.00 verða bestu bátar og skip í Norðoyggjum heiðraðir.

Øll tiltøkini á Sjómannadegnum eru ókeypis uttan dansurin um kvøldið.

## Standmynd avdúkað

Í sambandi Sjómannadagin í Klaksvík leygardagin avdúkar Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, eina standmynd, sum kemur at standa á Stongunum.

Tað er listarmaðurin, bóndin, smiðurin, tónleikarin og heimspekingurin Archibald Black, sum hevur sniðgivið standmyndina. Standmyndin ímyndar ein egningarmann í sannari støðd.

Úr tjúkkum rustjarni eru skornar plátur, sum síðani eru settar saman til standmyndina. Járnið er skorið til á Klaksvíkar Sleipistøð, og tað er smiðjusnillingurin Ólavur Samson, sum hevur sveisað hana saman.

Niclas Heri Jákupsson, sum er ein av stigtakarunum til Føroya Sjómannadag, eigur hugskotið til standmyndina.



*Soleiðis sær nýggja standmyndin í Klaksvík út*

*Mynd: Dávur Winther*

## Lena í oktober

Plátufelagið ArtPeople hevur nú ásett almenna útgávudagin av fløguni, sum føroyska songkvinnan Lena Andersen skal geva út í Danmark.

Sambært ArtPeople kemur fløgan hjá Lenu út í Danmark mánadagin 3. oktober.

Fløgan byggir á seinastu føroysku útgávuna hjá Lenu, men útgávan er eitt sindur broytt, og onkrir sangir eru skiftir út.

ArtPeople hevur roynt at slóða fyri útgávuni við at senda tvær stakfløgur til donsku útvarpsstøðirnar. Fyrst var tað »I still love you« og nú er tað »Step on the Gas«.

# – Sjómenn hava uppiborið ein slíkan dag

**– Sjómenn eru rættiliga anonymir, hóast teir eru grundstuðlar undir okkara samfelag. Teir hava uppiborið ein slíkan dag, sigur Niklas Heri Jákupsson, ein av fyrireikarunum av Sjómannadegnum í Klaksvík**

SJÓMENN

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fyrireikingarnar til Føroya Sjómannadag, sum fyri fyrstu ferð verður hildin í Klaksvík leygardagin, ganga væl. Tað er nógv at orna í seinastu løtu, men soleiðis er við einum hvørjum tiltaki, og fyrireikararnir gleða seg til stóra dagin.

– Vit hava tosað um hetta í nógv ár. Vit hava hildið, at vit áttu at skipa fyri onkrum tiltaki, sum hevði tilknýti til fiskiskap, tí tað er tað, sum vit liva – ikki minst her í Klaksvík, sigur Oliver Joensen, blaðstjóri á Norðlýsinum, sum er ein av fyriskiparunum av tiltakinum.

– Hugskotini um, hvat vit kundu gera, hava verið nógv, men ikki alt hevur borið til. Nú halda vit, at vit hava funnið eitt gott og hóskandi tiltak, sum kann vera við til at seta fokus á sjómenn og fiskiskap, sigur hann.

## Sera stórur áhugi

Niklas Heri Jákupsson er ein annar av fyriskiparunum, og hann heldur, at einki er meira sjálvsagt, enn at sjómenn fáa sín egna dag.

– Sjómenn eru rættiliga anonymir, hóast teir eru grundstuðlar undir okkara samfelag. Teir hava uppiborið ein slíkan dag. Og tað er eisini hugaligt hjá okkum, sum skipa fyri, at uppliva, at øll hava tikið líka væl ímóti tiltakinum. Vit hava fingið sera góðan stuðul, og nógv hava bakkað okkum upp, sigur hann.

– Nú tá ið dagurin nærkast, gongur tað upp fyri okkum, hvussu stórur hesin dagurin verður. Fiskiskapur og sjógvurin stinga sera djúpt í føroyingum. Hetta er nakað, sum vit hava skil fyri, og sum vit halda okkum eiga. Tí er áhugin fyri tiltakinum eisini sera stórur, sigur Niklas Heri.

## Markera sjómannin

Oliver Joensen heldur, at fiskivinnan ikki er so sjónlig í gerandisdegnum, sum hon skuldi verða.

– Fjølmiðlarnir geva ikki fiskivinnuni so stóra umrøðu, sum hon helst átti at fingið, men eitt slíkt tiltak kann vera við til at markera fiskivinnuna og geva henni meira umrøðu allastaðni, sigur hann.

– Kanska kann hetta eisini skapa áhuga fyri fiskivinnuni millum børn og tey ungu.

Fyrireikararnir fegnast nú eisini um, at gongd er komið á tilmeldingarnar til tær ymsu kappingarnar, og tí verður tað bæði stuttligt og spennandi, tá ið kappast verður um bæði eitt og annað, sum hevur tilknýti til sjógvin og fiskiskap.